Álit

í

løgtingsmáli nr. 51/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Fámjinstunnil við tilhoyrandi vegum (Hækka játtanarkarmin)

Landsstýrismaðurin í fiskivinnu- og samferðslumálum, Dennis Holm, hevur lagt málið fram 23. november 2023, og eftir 1. viðgerð 5. desember 2023 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 6. desember 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í fiskivinnu- og samferðslumálum, Dennis Holm, saman við Landsverki og Jarðfeingi og landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Uppskotið snýr seg um at hækka játtanarkarmin fyri verkætlanina Fámjinstunnil við tilhoyrandi vegum, so at upphæddin, sum landsstýrismaðurin kann nýta, verður 252 mió. kr. Tað er ein hækking à 45 mió. kr. frá 207 mió. kr. í galdandi verklagslóg.

Nýggja farleiðin verður 2,6 km tilsamans. Tunnilin verður umleið 1,2 km langur og 8,5 m breiður. Harumframt skal umleið 1 km av vegi gerast Ørðavíkarmegin og umleið 400 m av vegi Fámjinsmegin.

Tøk játtan til nýggju farleiðina til Fámjins er 97,5 mió. kr. í 2023. Tørvur er á eykajáttan uppá 25,0 mió. kr. í 2023 til at fíggja meirkostnaðin og tryggja framdriftina í arbeiðinum. Verður eykajáttan veitt, verður tøka játtanin sostatt 122,5 mió. kr. í 2023. Eftir at játta eru 88,0 mió. kr. Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2024 eru 84,0 mió. kr. settar av til verkætlanina. Av hesum eru 16,0 mió. kr. settar av til meirkostnað í sambandi við fyrra omanlopið, og sostatt verður neyðugt at hækka uppskotnu játtanina í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2024 við 4,0 mió. kr., soleiðis at játtaðar verða 88,0 mió. kr. til Fámjinsfarleiðina komandi ár.

Avbjóðingar hava verið við arbeiðinum við verkætlanini, tí at tilfarið í fjallinum hevur víst seg at vera sera vánaligt, og tvey stór omanlop hava verið í Fámjinstunlinum í ár í sambandi við arbeiðið at bora tunnilin, har stórar nøgdir av gróti eru dotnar niður úr loftinum. Nevndin hevur fingið upplýst, at eftir fyrra omanlopið vórðu kanningar og metingar gjørdar av restini av fjallinum, har borast skuldi, og tá var niðurstøðan, at sannlíkindini vóru avmarkaði fyri omanlopi í partinum av fjallinum, har tað leyp seinnu ferð.

Fyrra omanlopið, sum var í apríl, verður mett at hava dýrkað verkætlanina við umleið 15,0 mió. kr. Seinna og større omanlopið, sum var 9. oktober, verður mett at kosta 30,0 mió. kr.

Nevndin er harumframt upplýst um, at serlig trygdaratlit nú verða tikin, tá seinastu umleið 260 metrarnir, sum eftir eru, skulu borast. Hetta hevur nakað av eyka kostnaði við sær. Lýstu hendingar

og avbjóðingar hava eisini við sær størri útreiðslur til byggipláss, maskinrakstur, verkamenn og til útbúnað og tilfar til tunnilin, so sum betong, stál, jarn og skúm.

Við hesum viðmerkingum tekur nevndin undir við at hækka játtanarkarmin, so at tunnilin við tilhoyrandi vegum kann gerast liðugur, eins og at trygdin kann verða uppraðfest, og mælir tí Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 11. desember 2023

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Eirikur í Jákupsstovu	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	